# já demokratunum



*John McCain er á gamalsaldrinum vorðin fremsta boðið hjá republikanarunum uppá ein forseta, hóast hann møtir harðari mótstøðu í tí republikanska baklandinum*
*Mynd: Polfoto*

## Samanteljing

**Demokratar (vinnarin skal hava minst 2.025 umboð)**

| Valevni | Tal av umboðum |
|---|---|
| Hillary Clinton | 1198 |
| John Edwards | 26 |
| Barack Obama | 1223 |
| Samanlagt | 2447 |

**Republikanarar (vinnarin skal hava minst 1.191 umboð)**

| Valevni | Tal av umboðum |
|---|---|
| Mike Huckabee | 241 |
| John McCain | 821 |
| Ron Paul | 14 |
| Mitt Romney | 288 |
| Samanlagt | 1364 |

*Kelda: Associated Press 13. februar*

í Kongressini, um hann gerst forseti. Hetta fellur als ikki í góða jørð hjá heykunum úti á høgravonginum.

Fyri fýra árum skrivaðu fjølmiðlar, at tað demokratiska forsetavalevnið John Kerry møguliga fór at heita á McCain um at gerast varaforseti, og tað sigur ikki so lítið um profilin hjá honum.

Men John McCain er nú farin at fríggja til tann konservativa vongin í flokkinum. Komandi mánaðirnar fer McCain væntandi at leggja á ein meira konservativan bógv, soleiðis at hann kann vinna fleiri viðhaldsfólk í tí konservativa leguni. Eitt nú í spurninginum um fosturtøku roynir hann at gera vart við seg sum íðin mótstøðumaður ímóti abort.

McCain hevur allatíðina verið fyri innrásini í Irak, men hann hevur samstundis funnist harðliga at George Bush fyri at hava lagt kríggið illa til rættis. Hann atkvøddi eisini ímóti skattalættunum hjá George Bush við tí grundgeving, at skattalættarnir bara komu teimum ríku tilgóðar.

McCain hevur í fleiri málum verið í beinleiðis konfrontatión við George Bush og hevur ongantíð sitið væl um sátt við sitandi forseta. Hetta kann vera ein fyrimunur hjá honum, tí at hann harvið umboðar eina broyting í mun til undanfarna forseta, hóast teir hoyra til sama flokk.

Avleiðingin av einum valstríði millum Clinton ella Obama øðrumegin og McCain hinumegin er, at nógvir konservativir og religiøsir veljarar fara at kenna seg heimleysar. Stóri spurningurin er tí, um McCain fer at megna at mobilisera hendan stóra bólkin av traditionelt republikanskum veljarum. Um hesin bólkurin situr heima á valdegnum, kann tað gerast torført hjá McCain at vinna í november.

Hjá George Bush var lykilin til tey Hvítu Húsini at mobilisera eina veljarafjøld, ið fyrst og fremst atkvøddi við religiøsum motivum. Fleiri vænta, at McCain nú fer at alliera seg við Huckabee, sum fær stuðul frá konservativum og "teimum evangelisku", sum tey verða nevnd í USA. Huckabee kann tí gerast varaforsetavalevni hjá McCain fyri at savna baklandið hjá flokkinum.

Eingin ivi er tó um, at McCain skapar sundurlyndi í republikanska flokkinum, og hansara avbjóðing verður at savna baklandið. Eitt vanligt mynstur hevur verið, at eftir at kandidatarnir hava tryggjað sær sigurin innanfloks, flyta teir seg inn á miðjuna fyri at vinna veljarar, ið framvegis ivast. Men hjá McCain kann tað vera øvugt, tí hann má flyta seg út til høgru fyri at fáa stuðul frá tí konservativa baklandinum í flokkinum.

## Demokratarnir makta hvønnannan

Enn er als einki avgjørt í valstríðnum í demokratiska flokkinum. Í løtuni stendur so at siga á jøvnum millum Hillary Clinton og Barack Obama. Tó hevur Barack Obama í løtuni ein lítlan fyrimun.

Ein vandi við hesum er, at meðan republikanska valevnið nú kann hyggja fram ímóti forsetavalinum í november, skulu demokratisku valevnini framhaldandi konsentrera seg sum at vinna innanhýsis dystin.

Hetta fer væntandi at geva McCain ein fyrimun, tí hann kann fult og heilt fara undir at savna tað republikanska baklandið í stríðnum ímóti demokratunum.

Fleiri vænta, at demokratarnir ikki fara at finna sítt valevnið fyrr enn á landsfundinum í august. Munurin millum Obama og Hillary er sera lítil, og um hvørki av valevnunum megnar at vinna nóg nógv umboð áðrenn landsfundin, verða tað tey sokallaðu "superdelegates", sum fara at hava tað avgerandi orðið. Tey superdelegaraðu eru borgarstjórar, guvernørar og kongress-limir, sum eisini hava atkvøðurætt á landsfundinum, men tey kunnu frítt velja annan av kandidatunum eftir persónligari sannføring.

McCain er tann royndi politikarin og krígshetjan, sum veruliga kann bjóða demokratunum av á komandi vali. Allir indikatorar hava víst, at demokratarnir hava góð kort á hondini, men McCain verður ikki løttur at syfta. Spennandi verður tó at fylgja við í maktdystinum, sum fer fram í republikanska leguni í løtuni.